**Søga av Bakkafjørðinum:**

# Mamman fór til Amerika og sonurin til Rituvíkar

**Tað eru fleiri áhugaverdar frásagnir um sambandið millum Føroyar og Ísland. Á ferðini hjá Smyril Line til Bakkafjørðin fingu vit søguna um, hvussu Einarsson navnið kom til Rituvíkar**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Við á ferðini vóru systkini Eiler Einarsson og Hanna Nielsen f. Einarsson. Tey høvdu eina serliga grund at koma við hendan túrin, tí teirra uppruni er júst á leiðunum, sum vit vitjaðu. Tey eru eisini kelda til hesa frásøgn, sum tey aftur hava fingið frá fleiri keldum í Íslandi og Føroyum. Navnið Einar var navnið á bóndanum á garðinum Vikurgerði á Fáskrúðsfirði í 12 ættarlið.

Her var Einar Einarsson føddur 29.12.1885. Einar, faðir hansara (1857-1900), var bóndi í Vikurgerði, sonur hansara Einar, sum henda søgan snýr seg um, var borin til garðin.

Pápi Einar doyði í 1902. Mamma hansara Sigurbjørg Tóradóttir, selur tá garðin og fór við tveimum børnum fyrst til Canada og síðan til Norður Dakota í USA. Dóttirin kallaðist Oddny Kristin Soffía. Hon bleiv gift og fekk børn, men flutti longur vestur í USA. Hana vita tey ikki meira um enn. Sonurin var Halldór Ingvard Einarsson f. 26.08.1896. Funnið varð fram til hansara gjøgnum herin, har tey áttu mynd av honum í búna. Hann arbeiddi sum telemontørur og var giftur sum eldri við eini einkju við børnum, men tey fingu eingi børn saman. Halldór Ingvard gjørdist 90 ára gamal.

Einar yngri, sum tá er um 15 ára gamal, velur at verða eftir í Íslandi, tá mamman fer til Amerika. Tað varð fortalt, at Laura, sum Einar seinni giftist við, goymdi brøv, sum komu úr Amerika fyri Einari. Hann bleiv so argur inn á mammu sína, tí hon hevði selt garðin undan honum og var farin av landinum. Hetta var hann sera keddur um, tí hugin til at bóndast var stórur, og tað lá sera væl fyri hjá honum. Hann hevði stak góð evnir, og sterkur skuldi hann vera sum fáur.

Annars varð sagt, at mamma Einar hevði eitt kondittarí í Amerika og tók annað arbeiði við síðuna av. Hon bar orð fyri at vera sera røsk. Dótturin giftist við einum manni Josef Kramer, sum kom úr Polen, Týsklandi ella Eysturíki, men tann dóttirmannin var hon ikki serliga fegin um. Hann var ikki serliga arbeiðssamur.

Einar kom til Bakkafjørðin umleið 1916-17. Hann búði á Bjargi og seinni á Høfn á Bakkafjørðinum, har hann var hjálparmaður hjá keypmanninum Halldór Runólfsson á Bakkafirði. Teir blivu serliga góðir vinir. Eisini var hann sjómaður.

## Laura misti bæði foreldrini

Arntrudur Lára Pétursdóttir var fødd 6. apríl1898 á Fremri-Hlíð á Vopnafirði. Pápi hennara Petur Kristjánsson kom av Reyðafirði og mamman Jónina Sigurðadóttir kom úr Einarsstaðasókn í S-Tingeyjasýslu. Tey blivu gift 3. mai 1896, og í 1901 eru tey í Hvammsgerði í Vopnafirði. Petur, pápi Lauru, fekk tuberklar og doyði. Mamman fekk krabbamein og doyr stutt eftir hann.

Børnini vóru sett út á garðarnar at verða. Hetta var ikki altíð so gott, tí tá Laura tosaði um at vera send út í „sveyt", ljóðaði tað sum nakað av tí ringasta, sum kundi henda einum barni.

Eftir konfirmatiónina kom Laura til Bakkafjørðin og tænti hjá Halldóri, har hon hitti Einar.

Einar og Laura giftust 08.12.1917 í Skeggjastaðar kirkju á Bakkafirði. Tey búðu á Høfn – í Halldórshúsi – á Bakkafirði til 1919. Hesi húsini eru eitt av teimum fáu, sum føroyingar húsaðust í, sum er til enn.

## Til Føroya

Einar og Laura komu at kenna brøðurnar úr Rituvík Jógvan, Elias, Magnus, Benadiktus og Hendrik Olsen á Bakkafjørðinum í samband við útróður har. Harvið kom gott samband altíð at vera teirra millum. Tað er fortalt, at Einar og Magnus vóru so serliga góðir. Hetta hevur so skapt áhugan hjá teimum fyri at flyta til Føroyar.

Tað var við Jógvan og Eliasi, at tey á fyrsta sinni komu til Rituvíkar. Tey eru so komin heim við skipi, sum flutti útróðarmenninar. Bátarnir hjá teimum stóðu eftir yviri í Íslandi. Beiggi Lauru, Ingimund, var eisini í ferðalagnum.

Tað var sera fátæksligt á teimum smáu plássunum í Íslandi, so tey hava helst vónað, at støðan kundu bara blíva betri í Føroyum saman við góðum fólki. Í Íslandi høvdu tey heldur onga familju eftir.

Ta fyrstu tíðina búðu tey inni hjá Diktusi. Helst hevur Ingimund búð heima hjá Jógvani, meðan Elias gjørdi pláss fyri teimum í kjallaranum. Har bleiv veggur settur upp í gongini, so kúgvin var fyri seg sjálva. Tískil høvdu tey eina roykstovu og eitt rúm afturat. Tey fingu tvey børn afturat, meðan tey búðu har.

## Aftur til Íslands

Í 1925 velja Einar og Laura at fara aftur til Ísland, og tá fara tey við deyðsiglara. Lítið mundu teir hava vitað, tí fýra dagar eftir, at tey eru komin yvir á Fáskusfjørðin, átti Laura eina dóttir, sum bleiv doypt Jenny Elsa, eftir brøðrunum Jógvan og Eliasi.

Men børnunum longdust so illa aftur til Føroyar. Serliga var hetta galdandi fyri Sigurjón Einar, sum



*Laura og Einar Einarsson fluttu úr Íslandi til eitt betri lív í Føroyum*



*Teirra elsti sonur Sigurjón Einar var føddur á Bakkafjørðinum*



*Ingimund Pjeturson kom saman við systrini Lauru til Føroya*

tá var um 7 ár. Laura fortaldi, at bara hann sá eina føroyska slupp, so vildi hann biðja um pláss heim. Tískil valdu tey at koma aftur til Føroya árið eftir. Umstøðurnar í Íslandi hava heldur ikki verið ov góðar tá.

Tey koma aftur á heysti 1926 og fara at byggja hús. Tvey ár seinni flyta tey niðan í húsini. Einar velti sær eina trø úr haga, og kúgvin kom í kjallarin. Har hava verið góðar og sterkar hendur, sum hjálptu til, tí tungt var at koma niðan við tilfari, hóast grótið kom oman úr haganum.

Tað tók Einari einans tvey ár at leggja inn tað fyrra gerðið, sum Eiler hevur í dag, umframt at húsini blivu bygd, lagað úr gróti og stoyptar skjøldrar. Eftir tað bleiv trøðin hjá Ingimund eisini løgd inn.

Einar sigldi mest við Magnus í Rituvík, men hann var eisini onkrar túrir við millum øðrum Hanusi í Rituvík.